# Føroyskir rockbólkar spæla á stórum konsertum



Clickhaze

**Hesa vikuna verða tríggjar áhugaverdar konsertir kring landið. Bólkar sum Týr, Clickhaze, Hatespeech og Mold fara at spæla á hesum konsertum**

TÓNLEIKUR
*Pop.fo*

Í samband við, at Plátufelagið Tutl fyllir 25 ár í 2002, verður skipað fyri ymsum tiltøkum gjøgnum alt árið.

Longu í hesi viku verða tríggjar fjølbroyttar og áhugaverdar konsertir á skránni. Hesar konsertirnar eru skipaðar í samstarvi millum Tutl, Grót og Norðurlandahúsið.

Tey, sum fara at spæla á hesum konsertum, eru Clickhaze, Týr, Mold, 200, Hatespeech og Pete Tilly & Brian Gillingam. Teir báðir seinast nevndu spæla ljóðføri úr Australia og Afrika: didgeridoo, bongo, djembe og annað.

### Ymsa staðni

Fyrsta konsertin verður í Støkk-høllini hóskvøldið 10. januar klokkan 20.00. Har fara Clickhaze, Týr, Kári Sverrison og Pete & Brian at spæla.

Fríggjakvøldið 11. januar klokkan 22.00 stendur TB-húsið á Tvøroyri fyri tørni. Tá fara Týr, Hatespeech, Clickhaze og Pete & Brian at spæla.

Seinasta konsertin verður í Norðurlandahúsinum í Havn leygarkvøldið klokkan 19.30. Har verða luttakandi bólkarnir Hatespeech, 200, Clickhaze, Týr og Mold.

Bæði Mold og Hatespeech hava ikki spælt alment í fleiri ár. Hinir føroysku bólkarnir hava gjørt nógv vart við seg seinasta árið.



Týr

# Nú skal Chase royna seg á 15 teimum bestu



*Vakra balladan "Tú og eg" hjá Chase skal nú royna seg á hitlistanum hjá Útvarpinum*

**Fyrsti sangurin av útgávuni hjá Chase er nú eykalag á 15 teimum bestu. Kosni sangurin er ein av teimum stillu sangunum á fløguni**

TÓNLEIKUR
*Pop.fo*

Vakra balladan Tú og eg skal nú royna seg á hitlistanum hjá Útvarpinum.

Hesa vikuna er sangurin eykalag á listanum, og so er tað upp til tey, sum atkvøða fyri sangunum á listanum, at gera av, um Chase skal inn í hitan.

Fløgan hjá Chase, Sum tjóvur á nátt, kom stutt fyri jól, og hon hevur selt væl. Hetta er fyrsti sangurin av hesi útgávu, sum er í uppskoti til 15 tær bestu.

Í løtuni eru tveir sangir á listanum. All That Rain er nummar 3 við I'm Sorry, og gospelbólkurin I AM er nummar 12 við I Believe. Rocktónleikurin hevur góða undirtøku í løtuni, tí Linkin Park og Creed eru ovast á listanum.

### Chase spæla aftur

Chase var ein av bólkunum, sum spældu á nýggjárskonsertini í ár. Teir spældu sera væl, men onkursvegna høvdu teir trupult við at fanga áhoyrarnar.

Hetta hevur tó ikki fingið teir at missa mótið, og á heimasíðuni hjá teimum ber til at lesa, at teir nú fyrireika seg til at spæla aftur í Føroyum um stutta tíð.

Enn er ikki greitt, nær hesar framførslur vera, men tað er ikki sannlíkt, at tær verða í hesum mánaðinum.

# Símun Konoy heldur seg framat

**Føroyski sangarin hevur blandað seg uppí á hitlista við dansitónleiki, sum Kanal 1 í Keypmannahavn sendir**

TÓNLEIKUR
*Pop.fo*

Simon von Konoy.

Soleiðis rópar Símun Konoy seg, tá hann ger og spælir tónleik í Danmark.

Og Símun, sum er búsitandi á Fjóni, er ikki eiðasørur. Hann skrivar enn tónleik, og ein av sangunum hjá honum er komin á ein minni hitlista fyri dansitónleik - ella Dansk Top tónleik, sum tað eisini verður rópt niðri.

Tað er Kanal 1 í Keypmannahavn, sum eina ferð um vikuna sendir eina sending, sum tey rópa DanskTopScenen, og tað er á hesum lista, at sangurin Øl med tårer i hjá Símuni Konoy, heldur seg framat. Sangurin var í farnu viku nummar 11 á listanum.

Listin verður settur saman út frá eini atkvøðugreiðslu, sum lutvíst fer fram á internetinum. Teir sangirnir, sum fólk lata sína atkvøðu, sleppur við á listanum, meðan restin má verða uttanfyri.

Tað eru bara 11 sangir á listanum, og tí náddi Símun Konoy júst inn um í farnu viku.

Eru tað onkrir føroyingar, sum ynskja at atkvøða fyri føroyska sangaranum, so ber til at leita sær inn á heimasíðuna www.dansktopscenen.dk



Broytingar í pensjónslógini:

# Hjálp til sjálvhjálp



*Anfinn Kallsberg er glaður fyri nýggju skipanini, sum hann heldur kemur samfelagnum til góðar upp á nógvar mátar*

Løgmaður, Anfinn Kallsberg, helt fyri, at hetta vil eggja til hjálp til sjálvhjálp, soleiðis at fleiri fara at arbeiða longri og hugurin at arbeiða vil eisini veksa.

Karsten helt ikki tað vera nakað undarligt við tí, at uppskotið sá dagsins ljós júst, tá ið tað hevði ligið á borðinum hjá landsstýrinum í longri tíð. Og hetta hevur als einki við valið at gera, legði hann serliga stóran dent á.

Skipanin kemur at virka frá 1. januar 2002, t.e. fyri 9 døgum síðani.

Bæði Anfinn Kallsberg og Sámal Petur í Grund undirstrikaðu, at tað var alneyðugt at flyta fleiri pensjónistar úr niðaru bólkunum fyri tey, sum mestsum einki vinna uttan fólkapensjónina, um ráð skuldi verið fyri einari tílíkari skipan í framtíðini, tá ið munandi fleiri pensjónistar fara at vera í Føroyum.



*Karsten Hansen vildi ikki hoyra talan um, at hetta uppskotið hevði nakað við valstríð at gera*

**Tað fer at kosta 35 míó kr. meira fyri landskassan at gjalda fyri fólkapensjónirnar, nú broytingar verða settar í verk. Serliga ringast staddu pensjónistarnir fara at merkja ein munandi bata. Skipanin gevur eisini ein møguleika fyri hjálp til sjálvhjálp, ljóðar tað úr landsstýrinum**

PENSJÓNIR
*Heri á Rógvi*

Tey, sum eru fylt 67 ella fara at fylla 67 í næstum, kunnu so smátt byrja at gleða seg, tí landsstýrið ætlar at geva teimum meiri pengar millum fingrarnar. Landsstýrið, einamest Almanna- og heilsumálastýrið, hevur í longri tíð arbeitt við einari nýggjari skipan, sum skal gera tað betri at vera pensjónistur í Føroyum, samstundis sum skipanin skal gerast meira hóskandi til framtíðina.

Broytingarnar ella ábøturnar, sum tær eisini verða kallaðar, fara at kosta landskassanum umleið 35 milliónir krónur, men hetta er samstundis hjálp til sjálvhjálp.

### Ábøtur

Í Føroyum í dag eru tað 5.372 fólkapensjónistar. Nógv tann størsti parturin av hesum vinnur sær mestsum ongar pengar útyvir fólkapensjónina. 60% vinna undir tíggju túsund krónur um árið, og 80% vinna undir hálvtrýs túsund krónur um árið, um vit taka fólkapensjónina frá.

Afturat sjálvari pensjónini kemur eisini ein viðbót, sum er og eisini í framtíðini fer at vera ymisk, alt eftir hvussu nógv tann einstaki vinnur.

Munur er eisini gjørdur á, um tann einstaki pensjónisturin er giftur ella er stakur. Tey staku fáa meira í grundupphæddini og meira í viðbótini. Hetta verður eisini óbroytt eftir tí nýggja uppskotinum.

Størstu broytingarnar eru at finna viðvíkjandi, at grundupphæddin til pensjónistarnar verður skattafrí, bæði støk og gift. Harumframt verður pensjónsfrádrátturin tikin av. Viðbótin hjá øllum fer at veksa, soleiðis ein stakur kann fáa 28.244 krónur í viðbót, og ein giftur fær 21.840.

Sum heild eru tað allir pensjónistar, ið fáa ágóðan av hesum. Størsta munin, bæði lutfalsliga fara tey, ið vinna um 50.000 umframt pensjónina, at merkja. Fyri ein, ið ongan inntøka hevur umframt fólkapensjónina fer nýggja uppskotið at bera við sær, at 81.880 krónur ella 3.604 krónur fleiri enn áðrenn koma í kassan hjá tí einstaka.

### Dynamikkur

Á tíðindafundi týsmorgunin kundu teir tríggir, Anfinn Kallsber, Sámal Petur í Grund og Karsten Hanser, ernir leggja hetta nýggja uppskotið fram fyri umboðum fyri fjølmiðlarnar. Allir vóru teir á einum máli um, at hetta var eitt rættiliga gott uppskot. Fleiri onnur kend nøvn í føroyskum politikki høvdu eisini lovað sær við á fundin, og ein teirra, Óli Breckman, hevði á orðið, at talan her var um góðan borgarligan búskaparpolitikk.

Hóast útreiðslurnar verða fleiri til landskassan, so merkja hetta ikki bert, at landskassan missir upp á hetta. Teir 35 mió. eru við mistari skattainntøku.

Teir tríggir landsstýrismenninir dugdu allir at síggja, at hetta nýggja skipanin var rættiliga dynamisk, og landskassan eisini vildi vinna upp á hesa skipanina, men ætlanin var ikki at mjólka pensjónistarnar, sum tikið var til.

